## DAGSINS MEINING

# Jólaferðslan - ansið eftir hvørjum øðrum

Alt ov oftani gerast fleiri føroyingar offur í nógvu og torføru ferðsluni undan jólum. Hví skuldi tað henda júst nú gleðihátíðin nærkast spyrja mong av okkum, tá ófrættatíðindini ganga um, at vanlukka í jólaferðsluni hevur tikið onkran frá okkum.

Tað er altíð ein sorgarleikur, tá fólk koma til skaða ella doyggja í ferðsluni, men hetta kenst so svárt og rakar øll av okkum, tá tað hendir so tætt undan jólum, tá jólastákið er uppá tað hægsta og serstakliga børnini gleða seg.

Vit eiga eisini at ávara um vandamál í ferðsluni alla tíðina, alt árið og ikki bara hesa ársins tíð. Men ein orsøk er tó til at gera tað enn meira, nú tað er ein veruleiki, at nettupp undan jólum eru fyritreytirnar fyri óhappum og vanlukkum tær allar bestu, um man so kann siga. Sníkjandi hálkan, har vegirnir oftani eru sum á hvalabaki myrkar morgnar ella kvøld, er einki minni enn ein potentiellur drepari í ferðsluni, ansa vit ikki væl eftir hvørjum øðrum. Hálka og myrkur saman við jólaskundi og jólastrongd kunnu nevniliga gerast ein óhugnaligur cocktailur, um ikki bilførari ella gongufólk alla tíðina eru ansin og koyra og ganga eftir umstøðunum.

Góða veganetið, tunlar og meira nútímans skip gera tað lættari hjá fólki at røkka út um bygda- og býarmark, og hetta ger so aftur, at nógv fleiri fólk og ikki minst bilar trunkast saman á avmarkaðum plássum. Tað í sær sjálvum setir í veruleikanum nýggj krøv til fólk í ferðsluni - krøv um at vanda sær betri og taka hædd fyri hvørjum øðrum - fyri tí ókenda og óvantaða. Bara ein slíkur banalitetur sum tað, at ein bilførari ikki vísir av, brúkar blinkljósini, tá koyrt verður til høgru ella vinstru, kann vera eitt vandatekin. Tíverri tykist tað eisini vera ein sannroynd, at føroyskir bilførarar hava heimsmet - eru heimsins størstu amatørar, tá tað um henda sjálvsagda og mest einfalda ferðsluregul ræður. Tað tykist so gróðurfest hjá bilførarunum her heima ikki at brúka blinkljósini, at man skuldi trúð, at henda líkasæla og hesin dovinskapur var ein sjálvsagdur og náttúrligur partur av tí serføroysku ferðslumentanini. Vit ivast ikki í , at mong kunnu nikka játtandi við okkum í hesi staðfesting.

Latið okkum øll tí ansa eftir og vara av hvørjum øðrum í tí nógvu og vandafullu jólaferðsluni og lova hvørjum øðrum, at óhapp og vanlukkur skulu ikki sleppa at oyðileggja føroysku jólini í ár. Bert við at hava hetta í huganum, tá vit seta okkum í bilin, kann hvør av okkum gera hetta til veruleika.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Opið bræv til løgtingsformannin

**Løgtingsins røðarapallur - eitt opið forum fyri útspilling av almennum starvsfólki?**

**Gunnleivur Dalsgarð**
*formaður í Starvsmannafelagnum*



Á løgtingsfundi seinnapartin 13. des., var 2. viðgerð av uppskotinum nr. 12/2005 um at gera íløgur í útvarps- og sjónvarpsnetið. At hetta eru íløgur, sum eru grundleggjandi neyðugar fyri, at kunna røkja og menna okkara egna kringvarp, sum flestu føroyingar eru góðir við og ynskja alt tað besta, er sjálvsagt og krevur hetta tískil undirtøku frá løgtinginum.

Men - sum ikki einaferð - so fingu vit aftur eina staðfesting av, at løgtingsgáttin kann vera sera lág og at løgtingsfólk hava og fáa sera leysar teymar at hóreiggja sær við álopum, niðurgering og beinleiðis útspillingum av fólki í almennum størvum.

Hesi fáa ikki møguleikan at svara aftur, meðan løgtingsfólk sjálvi eru væl og virðiliga vard.

Og tað sær út til, at formannsskapurin bert talar at, um okkurt verður sagt niðursetandi um hvønn annan í løgtingssalinum ella onkra aðrastaðni í húsinum, ella um okkurt hálvt illavorðið orð gleppur onkrum av munni frá talarastólinum.

Hendan dagin hevði løgtingsmaðurin Hendrik Old eitt sera grovt og niðursetandi álop á tey, sum dagliga starvast í SVF og sum royna, at gera eitt arbeiði til lýtar, undir trongum og torførum umstøðum, tí júst politiska valdið hevur lítlan áhuga og rygg til at skapa fortreytirnar fyri, at vit kunna hava eitt føroyskt sjónvarp, sum sømir seg fólki, sum vil kallað seg mentað og framkomið.

At leggja hesi fólk undir ódugnaskap, onki at fáa av skafti, og at tey sita nøkur og bert nýta tíðina til endursenda o.s.fr., soleiðis sum orðini hjá hesum løgtingsmanni ikki kundu skiljast øðrvísi, er undir alt lágmark, og fara vit harðliga at átalað hesa niðurgerðing, samstundis sum vit eisini ákæra formannskapin ikki at gera sítt arbeiði til lýtar, tá slíkt kann fara fram uttan átalu. Vit hava krav uppá at fáa eina almenna frágreiðing frá formannskapinum, hví hetta letur seg gera og tað uttan at hetta verður átalað.

At løgtingsfólk missa tamarhaldið á sær sjálvum og lata orðafloym og orðavavstur fáa ræði at sær, er nakað vit vanliga eru von við, men vit kunnu ikki góðtaka og venja okkum við, at formannskapurin í okkara lóggávutingið letur slíkt um seg ganga, uttan at vakna við og tala at! Hetta er alt ov vánaligt! Vit fáa so altíð at vita frá hesum somu, at umstøðurnar mugu verða í hásæti, fyri at kunna røkja tignina uttan um hetta sama ting.

Vit góðtaka ikki, at starvsfólk, sum royna at gera sítt arbeiði til lýtar innanfyri teir karmar, sum politiski myndugleikin sjálvur ásetur, verða álopin frá løgtingsins røðarapalli við niðursetandi orðavavstri og beinleiðis útspillingum, og at formannskapurin ikki átalar slíka framferð. Heldur enn at bróta niður, átti alt at verið gjørt fyri vaksa um virðingina fyri lóggávuvaldinum, sum øll áttu at havt áhuga fyri,- ikki minst løgtingið sjálvt!

# Hava peningastovnarnir mjólkað kundunum?

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



**Niðurstøðan hjá flest øllum kundum má vera at tað hava teir, tí annars er tað okkurt heilt galið, at lækka rentuna nú, meðan altjóða rentan hækkar.**

Peningastovnarnir hava alment vátta, at teir hava ráð til hesa rentulækking og kundarnir føla seg tí sjálvsagt snýttar av, at hava goldið okursrentu í fleiri ár.

Tað er eingin ivi um, at peningastovnarnir við beráddum huga hava tikið okursrentu, menn takka verði einum nýggjum stjóra í minsta peningastovninum, ið kom við nýggjum tilboðum til kundarnar, vóru hinir stóru peningastovnarnir noyddir at fylgja við.

**Endurgjald**

Orðataki sigur: *tað sum er órættvist vunnið, ber onga gleði.* Støðan í dag vísir, at tað er ósatt, tá peningastovnarnir hava sagt við fjølmiðlarnar, at teir hava ikki rá til at lækka rentuna, tí munurin millum innlán og útlán er so lítil. Tí í dag hava teir lækka útlánsrentuna og hækka innlánsrentuna, so sannleikin frá teimum kann liggja á einum sera lítlum staði.

Um tað er nakar moralur í peningaverðini, er ringt at siga, men at kundarnir hava krav uppá endurgjald, er tað eingin ivi um.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.